# Tak børnini við til Tivoliland í Aalborg

Ein møguleiki í summar er at taka børnini við til Tivoliland í Aalborg. Heimasíðan hjá Aalborg kommunu nevnir Aalborg bý fyri ”barnanna bý”. Ein av møguleikunum at fara til, er Tivoliland. Tivoliland er ein heimur fyri seg við einari rúgvu av tilboðum. Tey flestu tilboðini eru gjørd einans til Tivoliland, og tí kunnu tey einans upplivast í Tivoliland.

Størsta einstaka tiltakið í Tivoliland er tann 40 metrar høgi ”Boomerang”. Tað er stoltleikin hjá Tivoliland. Tú drønar avstað gjøgnum sving og hæddir, og tá ið tú so endiliga heldur, at tað er yvirstaðið, so fert tú ein túr afturat - bara við rygginumtil hesaferð!

Eisini kanst tú fara til ”Gravity Tower”, har tú fært eitt ótrúliga flott útsýni, áðrenn tú verður kastaður úr 55 metra hædd í eitt frítt fall.

Eisini kanst tú síggja kenda klovnin Pjerrot, sum skemtar og gyklar. Um tú ynskir, at børnini skulu uppliva okkurt í summar, so er Tivoliland ein góður møguleiki.






















